Ein tríkantsflyting…

Í framtíðini kunnu stjórarnir í tryggingarfeløgunum báðum líta hvønn annan í eyguni tvørtur um Eystaru vág í Havn. Trygd flytir í næsta mánað oman í gamla Sjóvinnubankabygningin, har Ferðaráðið hevur hildið til í nøkur ár. Ferðaráðið flytir um reynið, og skal í framtíðini halda til undir Bryggjubakka 17, har KT-fyritøkan VIT heldur til. VIT flytir niðan í Tórsgøtu, har Trygd higartil hevur havt til húsa…

Mynd: Eirikur Lindenskov

Trygd flytur til Ferðaráðið, sum flytir til VIT, sum flytir til Trygd…

ROKADA
Eirikur Lindenskov

Tað ljóðar fløkt, men í apríl flytir Ferðaráð Føroya úr gomlu Sjóvinnubankahúsunum í Gongini í Havn. Ferðaráðið skal nú halda til, har KT-fyritøkan VIT heldur til undir Bryggjubakka 17.

VIT flytir í hølini hjá Trygd í húsunum hjá Petur Lindberg í Tórsgøtu, og Trygd flytir oman í gamla Sjóvinnubankabygningin í Gongini.

Tað er Føroya Banki, sum eigur Sjóvinnubankabygningin í Gongini eins og húsini hjá Trygd í Tórsgøtu. Fiskimannafelagið eigur hølini undir Bryggjubakka.

Nýggjur undirstjóri í Sparikassanum

Bogi Bendtsen er settur sum undirstjóri í Føroya Sparikassa við ábyrgd av kredittøkinum

FÍGGJARSTOVNAR
Eirikur Lindenskov

Tann 35 ára gamli Bogi Bendtsen varð í gjár settur sum undirstjóri í Føroya Sparikassa. Hann skal hava ábyrgdina av kredittøkinum. Bogi Bendtsen er útbúgvin cand. merc. aud. frá Handilsháskúlanum í Århus í 1995. Upprunaliga er hann í 1985 útbúgvin í Føroya Sparikassa. Hann hevur síðani arbeitt í umleið fimm ár sum grannskoðari hjá KPMG Paula Ellefsen pf., bæði áðrenn og aftan á útbúgvingina sum cand. merc. aud.

Í 1995 varð hann settur aftur í Føroya Sparikassa, og í 1997 varð hann útnevndur innanhýsis grannskoðanarleiðari.

Síðani september 1998 hevur hann verið kredittleiðari í Sparikassanum.

Sjálvstýrissemjan viðgjørd

Í gjár varð nýggja sjálvstýrissemjan hjá samgonguni viðgjørd fyrstu ferð á tingi

SJÁLVSTÝRISSEMJAN
John Johannessen

Nýggja sjálvstýrissemjan, sum staðfestir, at Føroyar hava sjálvsavgerðarrætt, og sum miðar eftir at yvirtaka málsøki og minka blokkin fram móti fullveldinum, varð viðgjørd fyrstu ferð á løgtinginum í gjár.

Sjálvstýrissemjan var fyrsta málið á skránni, tá tingfundurin varð settur klokkan tíggju gjáramorgunin. Á middegi, tá Sosialurin fór til prentingar, vóru framsøguræðurnar júst lidnar. Men kortini var nógv eftir av orðaskiftinum.

Í týsdagsútgávuni av Sosialinum fara vit at taka saman um framsøguræðurnar fyri tei ymsu flokkarnar.

Knallert, prutl og EU-súkkla

FERÐLA
Ráðið fyri Ferðslutrygd

– Hvør er munurin? Fólk villast eitt sindur í reglunum um tær ymsu sokallaðu motoriseraðu súkklurnar. Prutl er føroyska og løgfrøðiliga heitið á knallert. Eitt prutl skal ikki hava meira enn 50 kubikk motor og ikki koyra skjótari enn 30 km/t á sløttum.

Til hetta krevst bara vanligt koyriloyvi til prutl. Tær, danir kalla EU-súkklur, og sum vit kunnu kalla ES-súkklur, kunnu koyra 45 km/t, og her krevst, at førarin hevur annaðhvørt koyrikort til motorsúkklu ella til bil.

Farmur skal verða spentur fastur

FERÐSLA
Ráðið fyri Ferðslutrygd

Onkur hevur ilskast inn á løgreglumenn, tá ið teir hava átalað, at eitt nú kuffert hava ligið leys á baksetrinum, og hava kravt, at tey annaðhvørt skulu verða spent føst ella løgd aftur í viðførisrúmið.

Ferðslulógin ásetur, at slíkur farmur skal vera forsvarliga fastspentur, so skaði ikki stendst av hesum við møguligum samanstoyti.

Viðmerkjast kann, at hundar sambært ferðslulógini eru at rokna sum farmur, og skulu teir tí eisini sita fastspentir í bili.

Nú ber eisini til ymsastaðni at keypa trygdarbelti til hundar.

Skjóta skelti

FERÐLA
Ráðið fyri Ferðslutrygd

Fleiristaðni kring landið hava fólk til fragd at skjóta til máls eftir vegaskeltum og gøtulyktum. Løgreglan upplýsir, at hesi mál ikki verða viðgjørd sum brot á ferðslulógina, men sum brot á revsilógina. Ferðslulógin sigur bert, at tann, sum skalar ferðslutalvur ella merkir á ella við akbreyt ella súkklubreyt, skal beinanvegin fáa merkingina í rættlag aftur, um tað er gjørligt, og annars ávara onnur ferðandi. Men hesi mál eru annars at rokna sum revsilógarbrot og verða viðgjørd undir strongum reglum um herverk.

Hans Jacob Joensen, Føroya Bispur, heldur skotbráið at yvirtaka fólkakirkjuna innan 2002 vera alt ov stutt. Eftir hansara fatan hevði verið skilabetri at yvirtikið kirkjuna í 2006

Bispur óttast yvirtøku:

2002 ov stutt skotbrá

Kirkjan skal sambært nýggju sjálvstýrissemjuni hjá landsstýrinum yvirtakast í seinasta lagi 1. januar 2002. Men Føroya Bispur er á ongan hátt vorðin kunnaður um nýggju ætlanina

YVIRTØKA
John Johannessen

Fólkakirkjan skal undir føroyskt málsræði í seinasta lagi 1. januar 2002.

Hetta stendur greitt í nýggju sjálvstýrissemjuni hjá samgonguni, sum í gjár varð viðgjørd fyrstu ferð á tingi.

Men hægsti føroyski myndugleikin innan fólkakirkjuna, Føroya Bispur, er ikki kunnaður um ætlanina, og heldur ikki hevur politiski myndugleikin ráðført seg við hann, áðrenn avgerðin varð tikin.

– Eg haldi tað vera løgi, at eg ikki eri kunnaður um hesa ætlan, og eg má siga, at útmeldingin ørkymlar meg, sigur Hans Jacob Joensen, Føroya Bispur.

Ov lítil tíð

Í fullveldisætlanini, sum landsstýrið kunngjørdi á tíðindafundi í Tinganesi 1. februar, skuldi kirkjan yvirtakast í seinasta lagi í 2006.

Hesum hevði Føroya Bispur einki at mæla ímóti..

Hans Jacob Joensen sigur seg taka undir við, at kirkjan verður yvirtikin. Men hann heldur skotbráið til 1. januar 2002 vera alt ov stutt.

– Tað hevði verið rímiligt at yvirtikið fólkakirkjuna í 2006, men tað er drastiskt lop at flyta hetta til 2002. Fram til 2006 kundu vit umrátt okkum og fyrireikað yvirtøkuna. Men við nýggju ætlanini er ikki tíð til nakað sum helst, sigur Hans Jacob Joensen.

Bispur vísir á, at í 1992 varð farið undir at dagføra kirkjulóggávuna, men úrslitið fyrilá ikki fyrr enn 1. januar 2000.

Kortini eru summar av kunngerðunum, sum tá vórðu gjørdar, ófulfíggjaðar. Og sjálvt um eisini fleiri kunngerðir vanta, eru ongar gjørdar afturat hesar fimtan mánaðirnar frá 1. januar 2000 til í dag.

– Tí er lítið hugsandi, at vit megna hetta eftir nýggju mánaðum, sigur Hans Jacob Joensen, Føroya Bispur.

Drúgt nevndararbeiði

Tá Signar á Brúnni við loyvi frá løgtinginum gjørdi av, at fólkakirkjan skuldi yvirtakast við fullveldinum, varð ein nevnd sett at fyrireika yvirtøkuna. Nevndin skuldi bera so í bandi, at lógir og kunngerðir vóru í ordan og annað líknandi.

Arbeiðið í nevndini er enn ikki liðugt, og nevndin hevur at kalla ikki ráðført seg við bisp um nakað enn.

– Eg havi einaferð verið á fundi við nevndina. Men vit viðgjørdu bert eitt ávíst mál, sigur bispur.

Hans Jacob Joensen er ikki limur í nevndini. Men, tá nevndin er liðug við arbeiði sítt, skal álit sendast honum til ummælis.

Kirkjan kostar 15 milliónir

Í verandi støðu koma 15 milliónir árliga úr Danmark til Føroysku kirkjuna. Danski staturin rindar 5 milliónir, og sokallaði Felagsgrunnurin hjá Kirkjumálaráðnum rindar 10 milliónir.

Felagsgrunnurin hjá Kirkjumálaráðnum fær sín pening frá øllum teimum, sum rinda kirkjuskatt í danska ríkinum. Tað merkir, at ein partur av teimum 15 milliónunum frá Felagsgrunninum upprunaliga koma úr Føroyum.

Lønin í kirkjuni verður donsk

Hóast fólkakirkjan verður yvirtikin, verður lønin hjá Føroya Bispi donsk. Bispur verður eisini framvegis valdur úr Danmark

YVIRTØKA
John Johannessen

Skal danska grundlógin haldast, má bispur verða valdur og løntur úr Danmark, hóast kirkjan er yvirtikin.

Hetta heldur aðalstjórin í danska Kirkjumálaráðnum, Finn Langager Larsen.

Landsstýrið ætlar nevniliga at yvitaka fólkakirkjuna innan fyri rammurnar av heimastýrislógini. Tí heldur aðalstjórin í Kirkjumálaráðnum, at vit mugu fyrihalda okkum til grundlógina, sum sigur, at staturin skal stýðja upp undir fólkakirkjuna.

Í forsíðugrein í Kristeligt Dagblad 14. mars í ár vísir Finn Langarger Larsen á kirkjuna í Grønlandi, har bispurin enn formelt verður útnevndur av drotningini og verður løntur av Kirkjumálaráðnum. Hetta, heldur hann, tryggjar danskt eftirlit við, at kirkjan heldur seg til evangelisku- luthersku læruna.

– Vit mugu hava eitt minstamark av lívlínu til kirkjuna í Føroyum, um vit framhaldandi skulu halda okkum til orð grundlógarinnar um, at staturin skal stýðja upp undir evangelisku- luthersku kirkjuna, sigur Finn Langager Larsen, aðalstjóri við Kirsteligt Dagblad.

Kirkjumálaráðið er enn ikki formelt kunnað um ætlanirnar at yvirtka fólkakirkjuna innan 1. januar 2002.

Eldur í Suðuroynni í hálvt ár

Frá mai í fjør og árið út var eldur í jørðini á tyrvingarplássinum hjá IRF í Trøllavík í Suðuroynni

UMHVØRVI
John Johannessen

Nógvur roykur alt seinna hálvár í fjør úr tyrvingarplássinum hjá IRF á syðra armi av Trongisvágsfirði.

Orsøkin til roykin var, at eldur var komin í tyrvt tilfar, tá arbeitt varð við skeribrennara á økinum í mai í fjør.

IRF sigur í ársfrágreiðing síni fyri ár 2000, at tað fleiri ferðir varð roynt at køva eldin, fyrst við vatni og síðani við at leggja mold og fínan sand út yvir øki. Men hetta hjálpti bert eitt sindur. Roykurin minkaði munandi í august, men var ikki heilt burtur fyrr enn við ársenda.

Sambært frágreiðingini hjá IRF, hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan kannað spillivatnið frá tyrvingarplássinum, og er úrslitið í lagi.